LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 110/2024 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Bárði á Steig Nielsen, løgtingsmanni, um tjóðarsemju**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Í sambandi við fráboðanirnar frá løgmanni um, at hann millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi, Framsókn, Fólkaflokkin og Miðflokkin hevur funnið semju um, hvussu hann loysir avbjóðingarnar viðvíkjandi størri føroyskum uttanríkispolitiskum rásarúmi og atgongd til altjóða felagsskapir, kann løgmaður so nágreina, hvat innihaldið í hesi sonevndu tjóðarsemjuni er, og um ætlanin er at fáa til vegar slíkar heimildir innanfyri ella uttanfyri grundlógina?
2. Kann løgmaður harumframt upplýsa, um tað er komið fram á fundunum, sum vóru millum politisku stjórnarleiðararnar í Føroyum, Danmark og Grønlandi, hvørt Føroyar og føroyingar varðveita tær avtalur og teir fyrimunir, sum vit hava sum partur av ríkisfelagsskapinum, um vit taka okkum úr felagsskapinum?
3. Kann løgmaður upplýsa, hví hann meldar út um semjur, áðrenn niðurstøða er komin frá § 6-nevndini, ið hevði til endamáls at greina, um Føroyar kunnu fáa størri heimildir innanfyri grundlógina?

**Svar:**

**Til spurning 1 og 2**
Tíðliga í ár, og aftur í juni, hevði eg fundir við floksforfólkini í øllum flokkum á tingi um ríkisrættarligu støðu Føroya. Yvirskipað er tað mín greiða fatan eftir hesar fundir, at allir flokkar eru samdir um, at verandi støða ikki kann halda fram óbroytt, og at stóra avbjóðingin er, at Føroyar tørva størri uttanríkispolitiskar heimildir.

Síðani hava fimm av seks flokkum boðað frá, at teir ynskja eina skipan, sum gevur Føroyum uttanríkispolitiskar heimildir og byggir á samstarv millum javnbjóðis lond í einum felagsskapi.

Tað er ein sannroynd at verandi stjórnarrættarliga støða – um ikki altíð formliga, so í praksis - er ein forðing fyri at fáa limaskap í altjóða felagsskapum, so sum WTO, NEAFC, NAFO, EFTA ella Norðurlandaráðnum. Hóast verandi stjórnarrættarliga støða ikki hevði verið ein formlig forðing, so hevði altjóða rættur framvegis verið ein forðing. Flestu av altjóða felagsskapunum loyva tí bert limaskap til

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

sjálvstøðug lond. Hetta er eisini orsøkin til at uppskotið hjá Sambandsflokkinum, Nýtt Samband, ikki kann loysa avbjóðingarnar hjá Føroyum. Í staðin fyri at dúva upp á møguliga vælvild og brúka áratíggju upp á at biðja øll onnur - lond og felagsskapir - um at broyta sínar egnu mannagongdir, so ynskja vit sjálvi at taka ábyrgd og broyta okkara egnu støðu. Tað er tann einasta veruliga loysnin.

Tað krevst tí ein nýggj skipan, ið gevur Føroyum møguleika at útvega sær nýggjar heimildir á fleiri økjum. Endamálið er, at vit sum javnsett land fáa betri atgongd til handilsmarknaðir, felagsskapir, størri uttanríkispolitiskt rásarúm, samstundis sum vit eru í felagsskapi við Danmark.

Enn eru ongar samráðingar byrjaðar, og landsstýrið hevur bert yvirskipað greitt frá føroysku støðuni. Mítt útgangsstøði er, at vit broyta felagsskapin soleiðis, at hann verður millum javnbjóðis lond, soleiðis at Føroyar fáa neyðugu uttanríkispolitisku heimildirnar, meðan alt annað heldur fram óbroytt.

**Til spurning 3**
Sum eg havi skilt tað, so verður væntað, at §6 nevndin kemur við síni niðurstøðu í heyst. Eg veit ikki, hvør niðurstøðan verður, men sjálvt um tað skuldi vist seg, at niðurstøðan gongur føroyska ynskinum um WTO limaskap á møti, so fer hon bert at loysa ítøkiliga trupulleikan í mun til WTO. Tað fer ikki at broyta ta sannroynd, at flestu altjóða felagsskapir bert eru fyri sjálvstøðug lond.

Í Tinganesi, 26. juni 2025

Aksel V. Johannesen
løgmaður